


***Nr. 25*** ***9. desember 2018*** ***78. árg.***

# Fylling tíðarinnar

*Men tá ið fylling tíðarinnar kom, sendi Gud son sín. Gal. 4,4.*

Tá ið Maria átti son sín í Betlehem og reivaði hann og legði hann í eina krubbu, hendi at síggja til onki kollveltandi í heiminum. Dagurin eftir var sum dagurin fyri. Men Gud, sum hevur tíð okkara í sínum hondum, hevði lagt alt til rættis. Í tí givnu løtu, tá ið tíðarinnar kar var runnið fult, hendi stóra undrið. „Tá ið fylling tíðarinnar kom, sendi Gud son sín."

Tann, sum skrivað hevur Hebreara-brævið, sigur, at Jesus er „ápostul og høvuðsprestur." Ápostul merkir útsendingur, og skuldi hann bera Gudi sáttarofrið. Gud ***sendi*** son sín. Tey orðini mugu ikki vikast. Mong hava gjøgnum tíðirnar roynt at gera hetta loyndarmálið til okkurt, sum helst fór at henda. Men soleiðis var tað ikki. Tað skal standa einsamalt. Jesus er Guds ***útsendingur***, sum kom við gleðiboðskapinum. Hann er høvuðspresturin, sum einaferð fyri allar fekk til vega tað, sum var neyðugt. Hann er komin frá Gudi fyri at leiða okkum heim til Guds. Jóhannes sigur tað soleiðis, at „Gud hevur sent son sín hin einborna í heimin, fyri at vit skulu liva við hann."

Hetta eigur at vera tað fyrsta, sum vit leita eftir í jólunum, sum nú stunda til, og tá fer Gud at geva okkum alt hitt umframt. Tær mongu gleðirnar, tær góðu heilsanirnar, tann inniliga felagsskapin í heimi og kirkju. Latið okkum taka ímóti hesum og takka fyri, at vit hava so góð kor.

Gud spardi ikki sín egna son hin einborna, men gav hann upp fyri okkum øll; hetta er fasti grundvøllurin, sum vit byggja á. At tað so verða nógvir ósvaraðir spurningar og nógvar óloyst-

ar gátur eftir, er ein onnur søga. Vit hava eitt grundarlag og eitt støði. Gud hevur gripið inn í heimssøguna og gjørt vart við seg. Faðir várs Harra Jesu Krists er okkara faðir, og ikki ein einasti av okkum er gloymdur hjá honum. Tess djúpari henda sannføring festist í sinni okkara, tess størri gerst treysti okkara. So kunnu vit stríða stríð okkara við dirvi og fáa enn størri hug at syngja jólasálmar.

Í Betlehem tann sólin upp rann,
um heimin hon út mundi leita,
at Føroya smáttum veg hon fann,
tí tøkk vit tær Jesus veita.

# *Jól á Heartbreak-skarðinum*

Ein jólaaftan lá ein ungur hermaður illa særdur uppi á Heartbreak-skarðinum, einum tí blóðugasta vígvøllinum í Koreakrígnum. Feltpresturin fór tvørtur um skarðið og mundi dottið um hermannin. „Fái eg hjálpt tær, vinur mín?“ teskaði hann.

„Nei takk. Alt er í lagi,“ svaraði hermaðurin.

Presturin undraðist á, at tann ungi maðurin kundi vera so róligur eina slíka løtu. So bar hann eyga við Nýggja Testamentið, sum hermaðurin helt fast tvørturum. Og orsøkin til mansins sálarfrið var at finna á síðuni, har fremstifingur hansara lá ímillum í Nýggja Testamentinum. „Mín frið gevi eg tykkum.“ (Jóh. 14,27).

Í dag, mitt í trupulleikum, yvirgangi og kríggi, kann hesin friður ognast tær. Hann kann ognast tær, um tú setir álit títt á Jesus Kristus... Ævinleikans gáva kann gerast okkara ***nú***. „Tann, sum hevur sonin, hevur lívið. Tann, sum ikki hevur Guds son, hevur ikki lívið.“ (1. Jóh. 5,12). Hetta er veruligi jólaboðskapurin.

# *Boðskapurin ljóðaði á nátt*

Gev tær far um, at eingilin kom við boðunum til hirðarnar á nátt. Tað var ikki nátt, bara tí at sólin var niðurfarin, men tí at heimurin lá fjaldur í andaligum og moralskum myrkri. Mangan er tað so, at Gud staðfestir boð síni, tá ið myrkast er.

Tað var nátt í Egyptalandi, tá ið Ísraels børn vórðu fríað úr trælahaldinum har. Tað var nátt, tá ið Sámuel gjørdist Guds

rødd, sum kallaði hann til profet fyri Guds fólki. Tað var nátt, tá ið Gud gav Dávidi nakrar av vakrastu sálmum hansara. Tað var á nátt, at Paulus og Silas bóðu og sungu lovsang í fangahúsinum í Filippi. Og tað var á nátt, at Kristus varð føddur í Betlehem, og Harrans eingil kom við boðunum um, at ein frelsari var givin allari mannaættini.

Hjá mongum tykkara, sum lesa hetta, er tað nátt nú. Tað er nátt inni á sjúkrastovuni, har tú stríðist í ráðaloysi og neyð. Men eg vil fegin sleppa at siga tær, at handan skýggini skínur sólin. Tú kanst taka ímóti Jesusi í hjarta tínum, og hann kann koma við gleði og einum eldhuga og eini dýrd, sum tú aldri fyrr hevur upplivað – **um tú vilt geva honum lív títt.**



# Eitt val



*Tit kunnu ikki tæna Gudi og mammon.*
*Luk. 16,13.*

Guds navn kenna vit, og vit vita nógv um, hvat tað ber í sær. Men orðið *mammon*? Tað merkir upprunaliga *hitt fjalda.* Fyrstu ferð, vit hoyra,at tað verður nýtt í Bíbliuni, verður tað nýtt um ein dýrgrip, sum ein maður hevði lagt til viks og krógvað, so ongin skuldi síggja hann.

Haðani er orðið farið at merkja ríkidømi yvirhøvur. Men vert er at vita, at í hesum føri, tá ið Gud og mammon verða settir hvør upp ímóti øðrum sum Gud og djevulin, merkir mammon hitt fjalda og loyndarfulla. Soleiðis er tað við hinum ónda – hjá honum sleppur tú at verja lutir, sum helst ikki skulu koma fram í ljósið, men skulu verða fjaldir.

Boðskapurin hjá hinum ónda ljóðar: „Legg bara til viks! Lat vera við at siga hetta fyri nøkrum! Hav tað bara fyri teg sjálvan!“

Men hjá Gudi ljóðar tað øðrvísi: „Kom bara fram í ljósið við øllum! Ver ærligur og reiðiligur, lat vera at nýta sniðgøtur! Gakk ikki og hav tað fyri teg sjálvan, men hav tað saman við Gudi og menniskjum!“

Skuldi tað verið so torført at valt ímillum hesar báðar harrarnar? Og velja mást tú – tú kanst ikki tæna meira enn øðrum teirra.

*t.* týddi.

# *Stillar stundir*

Eitt syndrað kristinlív er eitt fátækt kristinlív, og í okkara órólıga heimi er so mangt, sum fær alt at syndrast og spjaðast. Tí tørvar okkum stillar stundir. Er bønarlívið veikt, verður kristinlívið veikt. Ja, um so tínar stillu stundir bera dám av einum syndraðum sinni, so fellur gerandisdagsins stríð og slit tær tyngri.

Í gerandislívinum finnur tú kristinlívsins hitamátara. Hevur tú ongantíð upplivað dýrdina, sum stendst av hinum stillu stundunum, tá veitst tú lítið um ríkidømi kristindómsins – tí júst í bønarlívi tínum upplivir tú hetta á bestan hátt.

Bønarinnar dýrd er soleiðis, at meira tú upplivir hana, tess meira leingist tær eftir henni. Tess regluligari bønarinnar lívssláttur er, betri og sterkari er títt kristinlív. Tá verður bønin ikki longur bara ein skylda, men ein kærleikans longsul. Í bønini er tað júst honum, tú ert saman við – hann, tú elskar.

Og hvussu mangar byrðar, sum í bønarinnar føvningi fullu av móðum herðum! Hvussu mong takksemis-smíl lýstu ikki fram ígjøgnum tár, tá ið menniskjað kom út úr stilla bønarkamari sínum! Hinar kærastu stundirnar hjá einum kristnum menniskja eru hinar einsligu stundirnar.

Lívið er sum ein hørð melduródn. Men í melduródnini er ein stillur depil – innast í henni. Og skal lívsins stormur ikki petta teg sundur, leita tá eftir hinum stilla deplinum – innast – hinum stillu stundunum í orðinum og bønini.

*Fredrik Wisløff.* – *t.* týddi.

---

Tað kemur eitt ættarlið, sum ikki skal doyggja, men sum verður rykt burtur, tá ið Jesus kemur í skýggjunum. *e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er nú eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | |
|---|---|---|
| 9. des. | Tekstur: Jes. 7,14 + 9,6; | bíbliuorð: Jes. 9,6a |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
**Umbróting & prent:** Prenta – 35 77 74




***Nr. 26*** ***23. desember 2018*** ***78. árg.***

# *Harrin er máttur og lovsongur mín*

*Harrin er máttur og lovsongur mín,*
*og hann varð mær frelsa. Jes. 12,2.*

Vit lesa í einum brævi, sum týski presturin Dietrich Bonhoeffer skrivaði úr einum fongsli hjá nazistunum, átta mánaðir áðrenn hann, 39 ára gamal, varð tikin av døgum:„Vit halda, at av tí at hatta ella hitt fólkið livir, hevur tað eisini hjá okkum meining at liva. Men í veruleikanum er tað tó soleiðis: at av tí at jørðin varð hildin verdug at bera menniskjað Jesus Kristus, tí eitt menniskja sum Jesus hevur livað; tí og bara tí, hevur tað fyri okkum menniskju eina meining at liva. Hevði Jesus ikki livað, so hevði lív okkara hóast øll onnur menniskju, sum vit kenna, æra og virða, verið meiningsleyst.“ Lívið er meiningsleyst, um vit ikki eru í Guds nærveru; og í Guds nærveru eru vit bara í trúnni á Jesus. Í honum er lívsins meining, lívsins lyfti.

Í hesum sama brævinum verður eisini nortið við, hvussu ofta Nýggja Testamentið nýtir orðini „at vera sterkur.“ Dietrich Bonhoeffer ger eisini vart við, at Kristus ikki bara ger eitt menniskja „gott,“ men eisini ***sterkt.*** Styrkin finst í lyftinum og ikki, sum vit hava lyndi at halda, í okkara ágrýtni. ***„Eg orki alt í honum, sum ger meg sterkan.“*** Tey orðini eru eisini skrivað í einum fongsli. (Fil.4,13)

Framtíðin er líka so ljós, sum Guds lyftir eru ljós. Ikki er torført, meðan sólin skínur, at siga, at so er. Rættiliga torført er tað í teimum tíðum, tá ið vit hvørki hóma veg ella rás.

Skulu vit gerast sterk, mugu ljósu tímarnir nýtast rætt. Vit mugu, fyri at venda aftur til Bonhoefer, „ógvuliga leingi og ógvuliga róliga leita djúpari inn í Jesu lív, virki, líðingar og deyða fyri at ásanna, hvat Gud lovar, og hvat hann uppfyllir.“ Vit mugu við gleði oysa vatn úr frelsunnar keldu og venja okkum í at syngja lovsang.

Nýt ta virðismiklu tíðina. Ver ikki nøgd(ur) við ein lítlan jólahugna. Leita inn í Guds nærveru og lat hetta vera játtan tína: ***„Harrin er máttur og lovsongur mín.“***

# *Ljósið handan deyða og grøv*

Tað var eitt heystkvøld. Ein ungur, bleikur og klænur maður stóð við kirkjugarðsportrið. Álvarsliga sjúkan hevði sett seg í lunguni, og hann visti, at hann skuldi doyggja. Skjótt skuldi hann liggja har inni á kirkjugarðinum í tí køldu, svørtu moldini. Hann kendi Jesus sum sín Frelsara; men sjálvur deyðin tóktist honum so ræðuligur. Og hann vildi so fegin liva.

Brádliga hoyrdi hann, at onkur nærkaðist. Tað er ein smágenta, sum kemur. Hon letur kirkjugarðsportrið upp og fer innum. Ungi maðurin steðgar henni:

„Ert tú ikki bangin at ganga gjøgnum kirkjugarðin, nú tað er myrkt?“ spyr hann.

„Bangin?“ sigur hon bilsin. „Nei, eg eri ikki petti bangin. Eg fari bara henda vegin, so at eg kann koma skjótari heim. Har yviri, har tygum síggja ljósið, búgvi eg.“ Hon peikaði á eitt ljós hinumegin kirkjugarðin. So segði hon góða nátt og kvikaði sær heim.

Men tað, tann lítla gentan hevði sagt, hevði stóra ávirkan á hann. Tað var, sum Jesus sjálvur hevði talað við hann gjøgnum orð hennara.

„Ja, tað er satt,“ segði hann. „Mítt heim og húsið hjá Faðir mínum liggur eisini hinumegin, og tað er púra óneyðugt hjá mær at ræðast grøvina. Tann vegurin førir meg skjótast heim.“

Alt í einum lýsnaði tað fyri honum. Við trúarinnar eygum kundi hann hyggja upp móti himli, har Jesus bíðaði honum.

*Effie Campbell* umsetti.

---

Vit seta mørk, av tí at vit eru góð við børn okkara og vilja verja tey.

*e. c.* ums.

# Vísmenninir úr Eysturlondum

Teir fóru avstað at leita eftir stjørnuni, hvør úr sínum heraðshorni. Við eitt hellusvað møttust teir. Við andans hjálp bíðaðu teir hvør eftir øðrum, og tá ið teir høvdu fingið sær ein bita, sum teir fyrst vælsignaðu, gjørdust teir vinir og lótu upp hjartað hvør fyri øðrum.

Skaldið, Johannes Jørgensen, sigur frá, hvussu teir komu til barnsins fyrstu legu: Spakuliga nærkaðust teir. Stillisliga fullu teir á knæ. Gávurnar bóru teir fram. Og barnsins móðir tók ímóti gávunum og rætti manni sínum tær yvir økslina; hann stóð aftanfyri. Teir royndu eisini at biðja sínar bønir. Kaspar bað, at onki kríggj skuldi vera longur, Baltasar bað um, at tað ikki longur skuldi vera nakar svangur muður.

Og Melchior – gamli, hvíthærdi Melchior – bað ikki hitt gamla menniskjað við harðari reyst og tárum um, at hann skuldi ikki síggja deyðan. „Harri,“ bað hann, „eg eri gamalur nú, men ikki mettur av døgum.

Hvønn morgun er sál mín full av tøkk, tí at eg uppaftur einaferð sleppi at opna eygu míni fyri dagsins lívsæla ljósi. Og hvørt kvøld, tá ið eg leggi meg til hvíldar, óttist eg, tá ið eg hugsi um, at Israfil (eingilin, sum tekur hina doyggjandi sálina í varðveitslu) kann koma um náttina og heysta meg, sum korn verður heystað við líggjanum, ella sum lokplantur, sum sankaðar verða saman og kastaðar í eldin. Harri, tú kongur jødanna! Gev lív – lív – lív!“

Er tað ikki hetta, vit biðja frelsaran um: frið á jørð – breyð á jørð – og lív, tá ið vit skulu smakka deyðan. Soleiðis enda tær sjónir, sum trúgvin kveikir í sinni okkara. Svørð skulu verða smíðað til plógjørn. Menniskjuni skulu býta hvørt við annað og øll vera brøður. Og lívsins kongur skal vera lív okkara í deyðans stund.

„Meðan hin gamli kongurin í Etiopia bað, hevði barnið reist seg í vøgguni og hugdi nú skiftandi at hesum trimum frómu pílagrímunum. Og meðan barnið hugdi, finglaðist tað við nøkur hálmstrá, sum tað hevði togað fram úr leguni, har tað lá. Tá ið Melchior tagdi, hevði barnið endað arbeiði sítt. Av hálmstráunum hevði tað flættað tríggjar krossar – og rætti nú hvørjum av hesum heilagu kongunum ein kross.“

So leikandi lætt og ljóst verður sagt frá. Og tó: hitt smílandi barnið í krubbuni setur seinni ein kross framman fyri hvørjum av vinum sínum – tann krossin at bera Guds vilja fram í einum heimi, sum stendur Gudi ímóti.

# *Valdið í allar ævir*

Vit hava so lætt við bara at hugsa um Jesus sum lítla barnið í krubbuni ella sum milda vísmannin, sum gekk her á jørð, tosaði vís orð og grøddi sjúk fólk.

Tá ið Pætur hevði upplivað páskirnar og hevði møtt Jesusi sum tann livandi eftir deyða og grøv, sá hann Jesus á ein heilt annan máta. Tá sá hann Jesus sum Gud og Harra við øllum valdi bæði í himli og á jørð.

***Alvalds Gud, vit prísa tær,***
***lova hátt í jarðartjøldum***
***tíni æru víða hvar***
***vilja vit við einglafjøldum,***
***falla tæt til fóta nú,***
***tekkja tína dýrd í trú.***

---

Vit kristnu eru ov ófør at minnast, hvat ið Gud gjørdi einaferð. Á jólum minnast vit Jesus sum pinkubarn, og tað var hann eisini. Men mong eru ikki komin víðari enn til pinkubarnið Jesus. Í dag eiga vit at kenna hann sum Kongur konga og Harri harra.

*e. c.* ums.

**Sunnudagsblaðið**

*ynskir øllum eini gleðilig jól*
*og Harrans signing í komandi ári*

*heilsan Blaðstjórin.*

**SUNNUDAGSSKÚLIN**

| | | |
|---|---|---|
| 23. des. | Tekstur: Luk. 2,1-20; | bíbliuorð: Luk. 2,10-11 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
**Umbróting & prent:** Prenta – 35 77 74